Norðurlendska Ráðharraráðið

# ÍVERKSETAN – ARBEIÐSSETNINGAR – INNSKÚLING

1.–3. flokkur





## Persónligir førleikar

*Eg stimbri mínar førleikar, tá ið ...*

- Eg tori at royna ymiskt, sum eg ikki dugi enn.
- Eg líti á, at eg kann læra/loysa tað, um eg gevi mær stundir til tess.
- Eg menni míni hugskot saman við teimum vaksnu.
- Eg gevi mær góðar stundir til hvørja uppgávu.
- Eg læri av mistøkum og haldi støðugt fram.
- Eg haldi á, hóast okkurt er trupult.
- Eg hugsavni meg um mínar uppgávur.

## Skapanarevni

*Eg venji míni skapanarevni, tá ið ...*

- Eg hugsi øðrvísi enn vanligt og brúki tað í tímanum.
- Eg brúki ymiskt, eg havi upplivað, til íblástur í skúlanum.
- Eg brúki hugflogið at gera royndir við ymiskum loysnum.
- Eg finni upp á fleiri hugskot og ikki bara eitt (heilarok).
- Vit kanna fyrimunir og vansar við ymsum hugskotum og loysnum.
- Eg brúki sansirnar og skapi myndir við orðum, sum t.d.: Eg hugsi, so at tað brakar í høvdinum.

## Virkisførleikar

*Eg venji mínar virkisførleikar, tá ið ...*

- Eg geri hugskot til veruleika.
- Eg arbeiði í bólki.
- Eg greiði øðrum í skúlanum og aðrastaðni frá tí, eg havi gjørt.
- Eg biði fólk, eg kenni, um hjálp.
- Eg nýti hugflogið at tekna ella byggja við tilfari ella talgilt.
- Eg vísi øðrum tað, eg havi gjørt.

## Umheimsførleikar

*Eg venji mínar umheimsførleikar, tá ið ...*

- Eg tosi um, hvussu ymiskt lívið kann livast t.d. í viðgerð av floksmentanini ella virðum skúlans.
- Eg rokni við pengum í støddfrøði.
- Eg læri um at hava eitt starv.
- Eg kanni umráðið, har eg búgvi, og tosi við onnur um tað:
- Hvat kann ein gera í umráðnum? Hvørji virki / stovnar eru her? Er okkurt, ið kann gerast betur?

*Íverksetanargrunnurin í samstarvi við Norðurlendska ráðharraráðið*

US 2017:447

Norðurlendska Ráðharraráðið

# ÍVERKSETAN – ARBEIÐSSETNINGAR – MIÐDEILD

4.–6. flokkur





## Persónligir førleikar

*Eg stimbri mínar førleikar, tá ið ...*

- Eg tveiti meg úti, har eg ikki grynni.
- Eg tori at gera og halda okkurt annað enn vinirnir.
- Eg taki ábyrgd og eri virkin við egnum eins og felags verkætlanum.
- Eg arbeiði, sum um eg dugi alt, um eg bert gevi mær nóg góðar stundir.
- Vit fáa hugskot og fara undir verkætlanir í felag.
- Eg geri semjur og dugi at meta um mál úr ymsum sjónarhornum.
- Eg eri ment/ur at halda áfram, hóast eg eri freistað/ur at gevast.
- Eg síggi gagn í feilum/misskiljingum hjá mær sjálvum og øðrum.
- Eg finni nýggjar leiðir, um trupulleikar stinga seg upp.

## Skapanarevni

*Eg venji míni skapanarevni, tá ið ...*

- Eg skifti ímillum skilvísa/miðvísa hugsan og skapandi/hissini hugsan.
- Eg gagnnýti læru í einari støðu, sum eg havi lært á øðrum sinni.
- Eg geri royndir við tí, eg læri, skilji tað sundur, og seti tað saman av nýggjum.
- Eg nýti hugflogið til at loysa fakligar trupulleikar.
- Eg finni íblástur á alnótini og har, sum eg búgvi.
- Vit tosa um fyrimunir og vansar við ymsum hugskotum og loysnum.
- Eg nýti ymsu sansirnar at læra meg sjálvan og onnur.
- Vit tosa um framtíðardreymar.

## Virkisførleikar

*Eg venji mínar virkisførleikar, tá ið ...*

- Eg kanni óvissur ísv. verkætlanir.
- Eg arbeiði í bólki, sum eg ikki havi valt sjálv/ur.
- Eg eri virkin og ágrýtin, tá ið arbeitt verður við verkætlanum.
- Eg havi framløgu.
- Eg leiti mær hjálp frá fólki, eg kenni.
- Eg nýti eitt nú ljósvørpuna at greiða frá hugskotum og úrslitum.

## Umheimsførleikar

*Eg venji mínar umheimsførleikar, tá ið ...*

- Eg samanberi ymsar mentanir, bæði heimligar og fjarskotnar.
- Eg menni mína heimsfatan.
- Eg leggi einfaldar fíggjarætlanir.
- Eg luttaki í frítíðarítrivum og frítíðarvirksemi.
- Vit tosa um alheimsmøguleikar og trupulleikar.
- Eg rannsaki samfelagsbygnaðin viðvíkjandi tilfeingi og búskapi.
- Eg kanni ymisk virkir.

*Íverksetanargrunnurin í samstarvi við Norðurlendska ráðharraráðið*

US 2017:447

Norðurlendska Ráðharraráðið

# ÍVERKSETAN – ARBEIÐSSETNINGAR – FRAMHALDSDEILD

7.–9. flokkur





## Persónligir førleikar

*Eg stimbri mínar førleikar, tá ið ...*

- Eg tveiti meg útí, har eg ikki grynni.
- Eg tori at gera og halda okkurt annað enn tað, ið vanligt er.
- Eg taki ábyrgd og eri virkin við egnum eins og felags verkætlanum.
- Eg havi egnar sannføringar, og eg arbeiði, sum um alt ber til.
- Eg geri royndir og fari undir verkætlanir sjálv/ur ella saman við øðrum.
- Eg skapi mín samleika óheft av mínum kringumstøðum.
- Eg haldi fram við ófullfíggjaðum arbeiði, tá ið eg havi tíð.
- Eg geri feilir/misskiljingar hjá mær sjálvum og øðrum um til møguleikar.
- Eg havi yvirlit yvir og tamarhald á torgreiddum uppgávum.
- Eg arbeiði av og á við tíðarkrevjandi verkætlanum.

## Skapanarevni

*Eg venji míni skapanarevni, tá ið ...*

- Eg skipi mína hugsan í stigum: málsviðgerð – hugskotsmenning – avgerð.
- Eg brúki mína vitan um ymisk fak samstundis.
- Eg geri royndir við egnum serkunnleika og samfelagsvitan.
- Eg royni ymiskar loysnir, tá ið fakligir trupulleikar stinga seg upp.
- Eg seti hugskot saman frá ymsu sonsunum, mótsetningum, tilknýtum og loysnum.
- Vit meta um fyrimunir og vansar við ymsum hugskotum og loysnum.
- Eg brúki sansir og kenslur í listarligum/fagurfrøðiligum høpi.
- Eg havi framtíðardreymar og -hugsjónir.

## Virkisførleikar

*Eg venji mínar virkisførleikar, tá ið ...*

- Eg geri óvissu- og váðametingar av verkætlanum, sum eg fari undir.
- Eg leggi til rættis og fullfíggi verkætlanir saman við øðrum.
- Eg arbeiði saman við fólki uttan fyri skúlan, sum hava aðrar førleikar enn eg.
- Eg havi framløgur.
- Eg leiti mær hjálp frá fólki, eg ikki kenni frammanundan.
- Eg menni eitt netverk av fólki, sum kann hjálpa mær.
- Eg fyrireiki mínar framløgur við ávísum málbólki í huga.

## Umheimsførleikar

*Eg venji mínar umheimsførleikar, tá ið ...*

- Eg samanberi ymsar mentanir og lívshættir.
- Eg skifti orð við onnur um mína heimsfatan.
- Eg leggi einfaldar fíggjarætlanir og føri roknskap.
- Eg leggi ætlanir um mína framtíðar yrkisleið.
- Eg meti um avleiðingarnar av alheimsgerð – møguleikar og trupulleikar.
- Eg greini, hvat tilfeingi eg havi tøkt.
- Eg hugsi um vøru, sølu, samskipan og búskap ísv. handilsrakstur.



US 2017:447